# Vit lupu ikki framav

**Alt ov lítið varð gjørt fyri at halda avtalurnar, vit gjørdu í samstarvsavtaluni og tí máttu vit fara, sigur Jaspur Vang, býráðslimur á Tvøroyri**



*- Vit lupu ikki framav, men hava umhugsa støðuna gjølla, sigur Jaspur Vang*

KOMMUNU-POLITIKKUR

*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

- Vit lupu ikki framav. Tvørturímóti hava vit umhugsað støðuna gjølliga.

Tað var ikki í óðum verkum, at sambandsflokkurin segði samgonguna í Tvøroyrar býráði upp fyri eini viku síðani.

Tað staðfestir Jaspur Vang, sum er annar av býráðslimunum hjá sambandsflokkinum á Tvøroyri.

Jaspur Vang, sigur, at eftir seinasta býráðsval, samdust alt býráðið á Tvøroyri um at samstarva í eini samgongu.

Men fyri góðari viku síðani gjørdu tey bæði sambandsfolkini í býráðnum av at siga samgonguna upp.

Tey bæði sambandsfólkini hava ikki viljað sagt stórvegis um, hví tey tóku hetta stigi.

Tey vilja framvegis ikki fara so nágreinliga inn í einstøk mál fyri ikki at órógva samstarvið meiri enn neyðugt.

Men nú sigur annað teirra, Jaspur Vang, kortini, at eftir teirra tykki, gjørdi býráðið ov lítið við at halda teir málsetningar, sum stóðu í samstarvsavtaluni, tá ið býráðssamgongan varð skipað.

**Settu treytaleys krøv**

Hann staðfestir, at samgongan í býráðnum var ikki bygd á politiskt samstarv ímillum tveir partar á jøvnum føti.

- Tvørturímóti varð tað grundað á flokspolitiska valdsbýtið í býráðnum.

Hann vísir á, at Javnaðarflokkurin hevur fýra av teimum sjey býráðslimunum á Tvøroyri og tí kann flokkurin skipað meirilutan einsamallur.

Og ta støðuna gagnnýtti javnaðarflokkurin eisini, tá ið samgongan varð skipað.

- Eftir býráðsvalið í 2004, settu teir fýra býráðslimirnir hjá Javnaðarflokkinum okkum eitt treytaleyst krav. Og tað kravið var, at Javnaðarflokkurin skuldi hava bæði borgarstjóran og varaborgastjóran.

- Javnaðarflokkurin kravdi at fáa formannin í teimum stóru nevndunum, sum eru tekniska nevnd, mentanarnevndin og sosiala nevnd og teir kravdu eisini meirilutan í øllum hinum nevndum.

Av tí at teir skuldu hava borgarstjóran, fingu teir av sær sjálvum eisini formannin í fíggjarnevndini, tí har er borgarstjórin altíð formaður.

Jaspur Vang sigur, at vildi sambandsflokkinum taka undir hesar treytir, skuldi flokkurin fáa umboð formannin í Havna- og Umhvørvisnevndini og tað hevði flokkurin annars ikki fingið.

**Vildi hava raðfestingar**

Hann sigur, at tá ið samgongan varð skipað, legði Sambandsflokkurin sera stóran dent á, at býráðið gjørdi eina raðfesting, har ein ítøkilig útbyggingarætlan varð stungin út í kortið fyri alt valskeiðið.

- Men tað hevur vilji ikki verið til fremja í verki, tí enn eru ongar raðfestingar gjørdar, hóast helmingurin av valskeiðnum er farið.

- Vit hava fleiri ferðir reist málið í býráðnum og vit hava enntá lagt uppskot fyri Býráðið um at gera ein raðfesting.

- Men tað hevur alt verið til fánýtis, sigur hann.

Hann sigur, at tað varð eisini avtalað at býráðsumsiting skuldu umskipast og møguliga styrkjast fyri at hækka tænastustøðið og fyri at bøta um umstøðurnar hjá teimum, sum arbeiddu í býráðsumsitingini og hjá kommununi sum heild.

- Men fyri einum ári síðan hendi tað beint øvugta, tí tá søgdu býarverkfrøðingurin og tvey fólk í teknisku umsitingini upp við teirri grundgeving, at arbeiðsumstøðurnar ikki vóru nøktandi.

Hesi viðurskifti hava onga veruliga eftirmeting fingu í býráðnum.

Í kjalarvørrinum á hesum málið, løgdu vit eisini uppskot fyri býráðið um at gera eina starvsfólkaskipan, soleiðis sum kommunustýrislógin eisini leggur upp til. Men tað vann heldur ikki frama.

- Alt hetta førdi til, at sambandsflokkurin ikki vildi leggja navn til samgonguna í Tvøroyrar Býráð longur og tí varð samgongan søgd upp.

Jaspur Vang sigur, at samanumtikið mettu tey í sambandsflokkinum ikki, at allir partar virdu samstarvsavtaluna í nóg stóran mun og vildu virka fyri tí, sum var avtalað og tí segði flokkurin avtaluna upp.

- Tað er meiningsleyst at vera bundin av eini avtalu, tá ikki allir partar virða hana, sigur hann.

Hann vísir eisini á, at tey eru ikki lopin framav í hesum málið, men hava umhugsað støðuna gjølla, samstundis sum tey góvu samstarvinum tvey ár

- Tað ber ikki til at selja síni yvirskipaðu sjónarmið fyri einhvønn prís - heldur ikki ein formanssess, sigur Jaspur Vang.

- Tað eydnaðist ikki at fáa eina viðmerking frá borgarstjóranum á Tvøroyri, áðrenn blaðið fór til prentingar.

# Projekta nýggjan bátahyl í Hvalba

**Hvalbiar Bygdaráð ætlar at kanna, hvat tað kostar at gera nýggjan bátahyl í bygdini**



*Tað er her, á norðara landinum, ímillum flakavirkið á Hamranesi, sum er aftast á myndini, vinstrumegin, og bátahylin, sum er fremri í myndini, at Hvalbingar umhugsa at gera nýggjan bátahyl til 60 bátar.*

*Myndina hevur John Næs Berg, tikið*

BÁTAHYLUR

*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

Hvalbiar bygdaráð hevur leingi arbeitt við møguleikanum at gera ein bátahyl afturat í bygdini.

Hugsað verður um at leggja bátahylin innanfyri flakavirkið á Hamranesi.

Hetta er ein spurningur, sum bygdaráðið hevur umhugsað í eina tíð og á fíggjarætlanini í ár eru 300.000 krónur játtaðar til at projektera ein bátahyl fyri.

Bygdaráðið hevur áður samtykt at fara undir hylin, treytað av at tey fingu neyvari upplýsingar frá Landsverki sum vístu, at tað læt seg gera, tekniskt og fíggjarliga.

Og nú hevur bygdaráðið samtykt at brúka peningin og at projektera hylin, fyri at fáa eina neyva kostnaðarmeting.

Bygdaráðið hevur áður fingið eina meting, sum sigur, at ein bátahylur til 48 bátar, kostar 4,6 milliónir, við bátabrúm og øllum. Men tá er mvg ikki við.

Men hylurin, sum nú er stungin út í kortið, er til 60 bátar. Hinvegin varð ført varð fram, at tað var ikki neyðugt at leggja allar brúgvarnar út beinanvegin.

Royndir, vísa, at ein bátahylir framvið landið innanfyri Hamranes, verður kyrrur og góður, men summir bygdaráðslimir vildu hava neyvari kanningar, tí teir stúrdu fyri, at alda fer at sláa aftur og inn í hylin á vissum ættum.

Bygdaráðslimir vístu eisini á, at skal hylurin gerast, verður neyðugt at koyra ígjøgnum túnið hjá flakavirkinum við gróti til hylin. Tí vilja bygdaráðslimir eisini hava greiði á, um loyvi fæst til tað. Fæst tað ikki, má nýggjur vegur gerast til hylin omanfyri flakavirkið.

# Kanna møguleikan at vetrarfriða Hvalba og Sandvík

**Bygdararáðið er nú farið at kanna, hvussu bygdirnar í sóknini kunnu vetrarfriðast og, hvussu nógv hetta fer at kosta**

VETRARFRIÐING

*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin .fo*

Nú verða Hvalba og Sandvík kanska friðaðar fyri seyð um veturin.

Bygdaráðið sóknini hevur samtykt at kanna, hvussu hesar báðar norðastu bygdirnar í Suðuroy kunnu verða friðaðar fyri seyð um veturin.

Samstundis hevur bygdaráðið samtykt at kanna eftir, hvussu nógv hetta hevði kostað.

Ein spurningur, sum skal kannast í hesum sambandi, er, hvønn rætt tey, sum hava seyð, skulu hava til beitið innangarðs um veturin, verður talan um vetrarfriðing.

Ein møguleiki er, at kommunan keypir alt beitið, so at tey, sum hava seyð ikki hava loyvi til at hava seyð innangarðs yvirhøvur, hóast hann er í stikið hjá eigaranum sjálvum.

Ein annars møguleiki er, at eigararnir fáa rætt at hava seyðin innangarðs. Men tá er treytin, at eigarin hevur hann stikaðan inni hjás sær sær sjálvum.

Ein vansi, sum bygdaráðslimir vístu á í hesum sambandi, er, at skal tað bera til at hava seyð innangarðs í stikum, verður øll sóknin avtaklað í stikum og tað verður ikki eitt prýði fyri bygdirnar.

Nú skal so trivnaðarnevndin í bygdaráðnum arbeiða víðari við málinum.

Í hesum sambandi umhugsa bygdaráðslimir at gera eina kanningarferð norðureftir at vita, hvussu aðrar kommunur, sum hava vetrarfriða bøin, hava gjørt.